# Yvirmannað b


Sløkkiðlismenn við roykkavaraútgerð sløktu eldarnar við skúmi

**Tað tók meira enn hálvan annan tíma at fáa øll tey skaddu burtur frá vanlukkustøðunum í Vágatunlinum mikukvøldið, men venjingin gekk væl, segði annar av donsku konsulentunum, Per Teglgaard, tá ið venjingin var av**

TUNNILSVENJING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Skuldi ein vanlukka hent í undirsjóartunlunum, er sera umráðandi, at tilbúgvingin er í lagi, og tí eru javnan venjingar í tunlunum.

Fimta hvørt ár er ein stór venjing, har so nógvir partar sum gjørligt av tilbúgvingini luttaka, og mikukvøldið var ein stór venjing í Vágatunlinum við samanlagt 166 luttakarum, harav nøkur og tjúgu vóru gestir.

## Væntað venjingin

Nevnast skal beinanvegin, at bæði sløkkilið, sjúkraflutningstænastan, bjargingarlið, løgreglan og øll hini luttakandi vistu frammanundan, at venjingin fór at verða hetta kvøldið.

Venjingin gekk út uppá, at eldur var komin í ein buss, sum var fullur av fólki, og tveir bilar vórðu so rendir inn í bussin.

Hinumegin frá kom ein vørubilur, sum av roykinum frá bussinum rendi inn í tunnilsveggin, av tí at bilførarin sá ikki at koyra orsakað av roykinum. Tríggir bilar rendu inn í henda vørubilin.

Tað vóru sostatt tvey vanlukkustøð.

## Samskiftið svíkur

Í undanfarnu kanningum hevur veikleikin í tilbúgvingini altíð verið, at samskiftið hevur verið ov vánaligt. At royna samskiftið var fremsta endamálið við hesi kanningini. Okkurt bendi á, at samskiftið í hesi venjingini heldur ikki var so gott, sum tað átti at verið.

19.03 kom eldur í bussin. Bussførarin boðaði frá vanlukkuni,og tá ið fyrsta fólkið fór eftir eldsløkkjaranum í tunlinum, fóru alllar ávaringar í gongd.

19.13 fekk stjórin fyri tunlinum boðini. Tá vóru øll sløkkiliðini og onnur kunnað.

Tað gekk ein løta, so var fyrsti sløkkiliðsbilurin í Kvívík á staðnum. Bilurin varð vendur, so hann var klárur at flýggja út aftur úr tunlinum.

## Róp og skrál

Úr bussinum, sum 13-14 fólk vóru í, hoyrdust róp og skrál. Róp um hjálp, og ein rópti, at har vóru trý fólk illa skadd.

Tað var ógvuliga stressandi hjá sløkkiliðsmonnunum at gera sítt arbeiði, meðan tey skaddu skrálaðu og róptu um hjálp.

Mitt í øllum ætlaðu tveir skaddir menn sær at rýma, men teir vóru steðgaðir av sløkkiliðsmonnunum úr Kvívík. Løtu seinni fóru tvær forfardar gentur úr bussinum og ætlaðu sær avstað, men hóast tær gjørdu mótstøðu, vórðu tær hildnar aftur.

Meðan vit standa við vanlukkustaðið hjá bussinum og teimum báðum bilunum, fáa vit ikki fylgt við, hvussu gongur á hinum vanlukkustaðnum.

Ein telefon hjá einum fyriskipara avdúkar, at tað gongur eitt sindur illa vágamegin hjá leiðarunum at hoyra hvør annan, men umsíðir skilst, at ein biðjur um at fáa fólk inn í tunnilin til tað vanlukkustaðið.

## Nógv skadd

Sløkkiliðið ger klárt til at sløkkja eldin í bussinum og teimum báðum bilunum, sum vit standa við. Eingin fer inn at hjálpa teimum í bussinum, fyrr enn eldurin er sløktur.

Teir spula við roykkavaraútgerð fyrst við vatni og síðani við skúmi.

Tá ið 22 minuttir eru farnir, frætta vit frá hinum vanlukkustaðnum, at níggju fólk har eru skadd, og at boð eru send eftir tyrluni. Alarmsentralurin hevur eisini fingið boð um hetta.

Sløkkiliðið í Kvívík veit, at um uppgávan er so stór, at teir ikki megna hana, skulu teir senda boð til Vestmannar eftir sløkkiliðnum har, og klokkan 19.28 frætta vit, at vestmenningar eru á veg.

Nakrar fáar minuttir eftir vóru vestmanningar á staðnum, og samstundis komu sjúkraflutningsfólk.

Hálvur tími gekk, frá tí at boðini um vanlukkuna ljóðaðu, til fyrsti sjúkrabilur var á staðnum.

Tá fóru so fyrstu viðgerðarnir frá sjúkraflutningstænastuni inn í bussin.

## Flýddu

Aftur flýddu tvær gentur úr


*Statistarnir vórðu smurdir, tí ein venjing skal líkjast eini veruligari hending*